## Sleppa undan Ribery

Tá franska landsliðið tann 12. august vann tepurt 1-0 á Føroyum á Tórsvølli, var Franck Ribery ivasamur, men kom kortini inn, tá 20 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki. Tá hevði Frakland longu fingið málið, men venjarin, Raymond Domenech, kendi seg ikki nóg tryggan, og valdi tí at spæla trumfin út. Framvegis er tað knæið, ið gevur Ribery trupulleikar, og nú Frakland skal spæla teir báðar seinastu dystirnar í HM-undankappingini, kennir hann seg noyddan at geva avboð. Frammanundan hevur Yoann Gourcuff, ið spældi allan dystin í Føroyum, eisini givið avboð vegna skaða.



## Henrik ætlar sær ongan veg

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, er saman við John Faxe Jensen undir stórum trýsti í Randers. Í fleiri dagar hava donsku bløðini skrivað, at uppsøgnin til teir báðar er á veg, men við bold.dk sigur Henrik Larsen, at hann ikki ætlar sær nakran veg.
– Mær dámar væl mítt arbeiði, og eg vóni eisini, at teimum dámar mátan, sum vit arbeiða uppá. So eg havi als ikki hugsað tankan um at fara nakran veg sjálvur, sigur Henrik Larsen.

# Kvinnukappingin ikki heilt liðug enn

**Dysturin millum KÍ og Skála varði bara í einar 10 minuttir, so var hann avblástur fyri veður. Enn er ógreitt, um hann skal avgreiðast kortini ella ikki. AB og Víkingur vunnu hinvegin stórsigrar á teimum báðum niðastu liðunum**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

– Tað, sum eg havi fingið at vitað, var dysturin millum KÍ og Skála avblástur, tí veðrið at spæla var ov vánaligt. Men eg veit einki um, at Fótbóltssambandið annars verið inni í málinum, sum fyrst skal viðgerast í kappingarnevndini, áðrenn støða verður tikin til, hvat hendir við dystinum.

Tað sigur formaðurin í kappingarnevndini, Sveinur Tróndarson, ið sostatt einki kennir til, at KÍ skal hava vunnið dystin 0-0, sum tað hevur ljóðað, at semja fekst um aftaná – enntá í samráð við Fótbóltssambandið. Sostatt er kvinnukappingin ikki heilt liðug enn, tí lagnan hjá hesum eina dystinum framvegis bíðar eftir einari endaligari avgerð.

Veðrið var annars so vánaligt, tá KÍ og Skála skuldu spæla, at dysturin var ikki meiri enn góðar 10 minuttir gamal, tá dómarin valdi at floyta hann av. Tá var støðan enn 0-0, og liðini høvdu havt eitt álop í part, umframt hvør sítt hornaspark, ið hvørki kundi takast, uttan at onkur helt bóltinum, tí hann annars fór fúkandi avstað.

At dysturin var avblástur, broytir tó einki í avgerandi støðuni, har KÍ longu frammanundan var meistari og Skála átti fjórðaplássið. Eftir dystin fingu KÍ-kvinnurnar eisini bæði steyp og gullheiðursmerki, sum formligt prógv fyri, at tær tíggjunda árið á rað eru føroyameistarar í bestu kvinnudeildini.

### Tveir stórsigrar

Hini bæði liðini, ið eisini fingu heiðursmerki leygardagin, AB og Víkingur, ið ávikavist fingu silvur og bronsu, høvdu í sínum seinasta dysti lætta mótstøðu, tí tey spældu ímóti ávikavist B68/NSÍ og EB/Streymi, ið eru tey bæði niðastu liðini á stigatalvuni.

AB vann heili 8-0 á B68/NSÍ, eftir at hava verið á odda 5-0 í hálvleikinum, og umframt at Ásleyg Súnadóttir hevði ein góðan dag við trimum málum, var tað mest merkisverda, at AB-málverjin, Simona Heinesen, skoraði tey bæði síðstu málini. Ikki við brotssparki, sum ofta plagar at vera, tá málverjar skora, men eftir hornaspørk, har hon var komin fram við og kom at standa væl fyri.

Dysturin millum EB/Streym og Víking var longu spældur týskvøldið, tí fleiri spælarar á báðum liðum longu mikudagin skuldu á námsferð uttanlands. Her gjørdist talan um ein greiðan stórsigur til Víking, ið vann 9-1, eftir hálvleiksleiðsluna 5-0. Longu eftir níggju minuttum var støðan 3-0, so her gjørdist ongantíð spennandi. Heidi Sevdal, ið sunnukvøldið var kosin ársins spælari hjá kvinnum, skoraði ikki færri enn fimm av teimum níggju málunum hjá Víkingi!



**Veðrið var ikki tespiligt, og dómarin sá seg noydda at blása dystin av. Men tað forðaði ikki Malenu Josephsen, liðskipara, at fara út á vøllin at taka ímóti 10. FM-steypinum á rað hjá KÍ-kvinnum**
Mynd: Norðlýsið



**Tvær av avgjørdu lyklaspælarunum hjá KÍ hava aftur í ár verið systrarnar, Ragna Patawary og Rannvá Andreasen**
Mynd: Norðlýsið

### 1. deild kvinnur

| Nr | Lið | Dystir | V | J | T | Mál | +/÷ | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 19 | 16 | 2 | 1 | 94- 7 | +87 | 50 |
| 2 | AB | 20 | 15 | 3 | 2 | 50-11 | +47 | 48 |
| 3 | Víkingur | 20 | 11 | 4 | 5 | 38-23 | +21 | 37 |
| 4 | Skála | 19 | 7 | 1 | 11 | 24-46 | ÷22 | 22 |
| 5 | EB/Streymur | 20 | 2 | 2 | 16 | 10-76 | ÷66 | 8 |
| 6 | B68/NSÍ | 20 | 1 | 2 | 17 | 8-77 | ÷69 | 5 |

### Úrslit, 20. umfar

**KÍ-Skála (avblástur)**

**AB-B68/NSÍ 8-0 (5-0)**
1-0: Bjørg Syderbø, 8.
2-0: Ásleyg Súnadóttir, 11.
3-0: Ásleyg Súnadóttir, 15.
4-0: Bjørg Syderbø, 30.
5-0: Barbara á Dunga, 45.
6-0: Ásleyg Súnadóttir, 48.
7-0: Simona Heinesen, 75.
8-0: Simona Heinesen, 88.

**EB/Streymur-Víkingur 1-9 (0-5)**
0-1: Mary Ann Isaksen, 5.
0-2: Heidi Sevdal, 7.
0-3: Anna Malena Højgaard, 9.
0-4: Hanna Isaksen Højgaard, 31.
0-5: Hanna Isaksen Højgaard, 41.
0-6: Heidi Sevdal, 46.
0-7: Heidi Sevdal, 50.
0-8: Heidi Sevdal, 59.
1-8: Ann Tóra Láadal, 71.
1-9: Heidi Sevdal, 77.